# Our language is the reflection of ourselves

*– Cesar Chavez*



Sambært Móðurmálsorðabókini[1] hjá Orðabókagrunninum, so fevnir orðið kropsmál bert um kropsburð og -rørslur:

> Signal sum kropsburður, rørsla, keipur o. tíl. avdúka (um kropsliga el. sálarliga støðu hjá viðkomandi), tá ið hon ikki skilti, nýtti hann kropsmál og peikaði á høvdið.

Tað eru fleiri enn Niclas Heri Jákupsson, ið hava funnið kropspartar í metaforum. Her eru tvey dømi:

- Det danske (krops)sprog inspirerer! Vores sprog er fuld af metaforer. Metaforerne kan bruges til udvikling af et mere nuanceret kropsligt udtryk. … "Bevar begge ben på Jorden" og "Tab ikke hovedet" — *Anne Lilballe, storyteller*
- Shoulder the blame • Foot the bill • Keep someone on their toes • Have an eye for • Go hand in hand with • Tongue-lashing etc.. — *Ten metaphors with body parts*

Eins og Niclas Heri, so eru hetta vanlig fólk sum brúka málið í teirra dagliga arbeiði, uttan serútbúgving í málfrøði. Tey eru tó fullvitandi um at einhvør málburður hevur sína ávirkan. Niclas Heri er yrkari, sangari, rithøvundur og tikin úr leikum sum frásøgumaður og skentari. Og hann er sanniliga ikki óvitandi um at orð og málbrúk eru altavgerandi.

Men, kropsmálið endar ikki har:

## Kropspartar í býarmyndini







Klaksvíkin hevur armar og Havnin er ein nalvi.

## Nøkur amboð vísa tenn, meðan onnur hava høvd










---

1 Ritstjórna hava: Jóhan Hendrik W. Poulsen, Marjun Simonsen, Jógvan í Lon Jacobsen, Anfinnur Johansen og Zakaris Svabo Hansen.

## Ikki er torfort at fáa eyga á eyguni í føroyska málinum




## Nógvir lutir hava tungu. Her eru trý dømi




## Kropspartar sum mátieind




## Hálsar finnur tú allastaðni




Við tað at fólk hava kyn — mannfólk eru kallkyn og kvinnur eru kvennkyn — so vilja vit eisini at flest navnorð eisini hava kyn. Sum sagt: føroyskt er eitt krops-orienterað mál. Tað er tó ivasamt hvussu tað er við logikki í kynum vit geva teim ymsu navnorðunum.

Sjálvt um kríatúr hava síni egnu lívfrøðiligu kyn (♀/♂), so geva vit teimum eisini eitt málsligt kyn:




Tað eru umleið 18 túsund navnorð í føroyskum. 52% av teimum eru kallkyn, neðan 32% eru kvennkyn. Restin (16%) hava onki kyn, sum t.d. tjaldrið. Í málfrøðini verður tað rópt hvørkikyn.

Her er vert at hava í huga, at tað vóru 4 mans og 1 kvinna, ið skrivaðu móðurmálsorðabókina. Føroyar vóru framvegis eitt mansdominerandi samfelag í 90'unum. Tað er tí ikki uttan orsøk at talið av kallkynsorðum er munandi hægri enn av kvennkynsorðum og samstundis varð kallkyn sett á teir stóru og sterku lutirnar, so sum sleggjhamari (sum hevur eitt tungt og fýrkantað høvd), og djór sum ravnur, ið er tiltikin ráðaríkur og tað sigst at hann drekkur tjaldursegg.

## Málfrøðiligt kynskifti (trans)

Tann fyrsti komputari, ið kom til Føroyar, var kallkyn. Seinni fingu teir eitt nýtt navn og við tí hendi eitt kynskifti:




## Kropspartar í føroyska landslagnum

Leitar tú á føroyakortinum, so finnur tú eitt ótal av kropspørtum: 32 høvd, 14 næsar, 12 eygur (eitt nú Heljareyga), 41 kjálkar (teirra millum Kjálkin undir Handastabergi á Sandoynni), 43 tungur (og tá er Uppi í Tungu í Mikladali ikki við á føroyakortinum). Nevn ein kropspart, og tú finnur hann á føroyakortinum.

## Teir tíggju fingrarnir vit hava, eru støði undir tíggju-tals skipanin







Í dag, tá so at siga alt er digitalt (digiti er latín og merkir fingrar), er talan um bert 2 fingrar: 0 og 1. Samanlagt hevur hesin PDF fílurin, tú hevur frammafyri tær, 4 mió. fingrar. Tað átti tí ikki at komið óvart á nakran at føroyskt (og flest onnur mál) er eitt krops-orienterað mál. Men, soleiðis er tíverri ikki. Nógvir føroyingar er óvitandi um at kropsstøðurnar *liggja*, *sita* og *standa* eru kropsmál.

Tann gløggi lesarin er greiður yvir, at her er talan um myndatalu, tí sjálvandi skal tað ikki skiljast bókstavliga, at ein hamari hevur høvd, ein skipstroyggja hevur eygur — bæði framman og aftan — og at teldan/fartelefonin er full av fingrum. Meðan onnur halda fast við, at tá sagt verður at *hús liggja*, so skal tað skiljast bókstavliga. Tey pástanda eisini at tað er nakað nýtt at hús *liggja*. Fakta er, at tað einasta *nýggja* í hesum er, at fólk eru farin at siga at *hús standa*.

**HÚS FÁA IKKI FRIÐ AT LIGGJA**




Malan Matras Joensen **Nú eru hús farin at liggja. Fyrr STÓÐU húsini!** […]

Sonne Smith Alt liggur í løtuni, sjálvt Eiffel-tornið.

Erla Berghamar: Skilji ikki, at tað skal vera ivamál, at hús standa. Tað hevur verið rættað alla mína tíð, um onkur hevur sagt, at "hús liggja". Húsini standa, og hús "standa væl fyri". Liggja tey, eru tey niðurdottin.

Óla Jákup Rólantsson Av húsum til sølu finna vit hús sum liggja og standa. "Húsini liggja væl fyri", "húsini liggja í veðurgóðum umhvørvi", "húsini liggja í barnavinaligum umhvørvi", "húsini liggja í hugnaligum umhvørvi" o.s.fr. Eini hús "standa ovalaga í bygdini" og eini "standa uppi á Hálsi" og eini "standa við sjóvarmálan". Í enskum kanst tú siga "our house lies in the quiet and tranquil situation….", men sanniliga eisini "our house lies in ruins", um tað er niðurdottið. Í norðurlendskum annars síggi eg bæði, hóast norsk hús tykjast at liggja meira enn tey standa. Vil tí ikki vera avgjørdur, tá eg ongar reglur kenni um hetta….

Óla Jákup Rólantsson Jú, og kortini lata mætir málmenn sum Heðin Brú og nógvir aðrir húsini liggja í lendinum, í dølunum, líðunum o.s.fr. So tað tykist framvegis, sum her er ein onnur dimensjón í hesum, hóast hon kanska bara er skaldslig ella poetisk. Sami trupulleiki er jú í enskum, hóast teir "erecta" húsini, so liggja tey sum oftast! So tað er ikki altíð, at tað sum verður reist, verður standandi!

Óla Jákup Rólantsson Tað liggur væl fyri at liggja í føroyskum: Oyggin liggur har so vøkur, fjørðurin liggur so langur, bygdin liggur fram við fjøruni og húsini liggja niðan í líðina, skipini liggja við kei, mjørkin liggur tjúkkur í botninum. Vit liggja frammi undir og liggja framvið, tí fuglur liggur á, og best er ikki at liggja sjóvarfallið av sær. Maturin heiman liggur væl á, einki liggur á láni og vit liggja á odda, annars liggja vit eftirá. Jørðin liggur til festið og tað liggur til okkum at liggja undir í vatni í liggjandi landnyrðingi.

Sonne Smith Jú, men Eiffel-tornið liggur ikki, tí at liggur tað, er tað niðurdottið. – *Føroysk rættstaving, 19. august 2011*

**O, MÓÐURMÁL, STÓRT ER TÍTT FALL**

Ágangurin á móðurmálið er stórur, og tað er ikki lætt at svimja móti streyminum, tá harðast leikar á. Har situr Erla Berghamar og rættar hús, tá sagt verður at tey *liggja*. Hon er totalt óvitandi um at ferðamannaskip eru ikki dottin á liðina, tá sagt verður at tey *liggja* á Havnin.

Meðan Sonne Smith stríðist við at fáa Eiffeltornið upp at standa, nevnir Óla Jákup Rólantsson m.a. at: "her er ein onnur dimensjón í hesum, hóast hon kanska bara er skaldslig ella poetisk" og "Vil tí

ikki vera avgjørdur, tá eg ongar reglur kenni um hetta…". Tað er týðiligt at sjónarringurin hjá Óla Jákupi er víðari enn hjá teim flestu.

Jú, vissuliga. Her *er* talan um eina aðra dimensjón; skaldslig ella poetisk. Tað er upp til tey leikfólk sum virðismeta móðurmálið, at seta navn á hesa nýggju dimensjónina, tí hendan dimensiónin er ikki at finna í nakrari føroyskari málløru, vit kenna til í dag. Lýsingarorðini *skaldslig* og *poetisk* eru vælhóskandi. Í hesi greinarøð verður *abstrakt* brúkt.

# Er tað nýtt at siga at hús liggja?

Her er nakað av tí sum KorpusFO hevur at bjóða




**Søgn um kong Sverre** Niðurskrivað 50 ár síðan: Kong Sigurd (Mund) var sonur Harald Gille. Hann ráddi yvir Nøreki saman við brøður sínum Eysten og Ange, eftir teirra faðirs deyð. [...] Uni [vápnasmiðurin] hevði biðið um Gunhild, og hon fekk tá pláss í bispagarðinum sum neytakona. Fjósið lá væl burtur frá húsum - sum oftast var tá í tíðini í Førjum [...] – *Oyggjarnar, 25. mai 1905*




Fåberg kommuna er nærhendis Lillehammer. Húsini liggja ógvuliga spjadd hvörju megin ein dal, so börnini hava langan og torföran veg til skúla. Skúlin liggur fyri seg niðri við ánna, [...] – *Skúlablaðið, 1. oktober 1951*




Bøurin breiðir seg yvir alt tað rúma slættlendið í dalinum og langt niðan í hallarnar fyri norðan og sunnan. Út um henda víða bøin liggja so tey hálvthundrað húsini slødd, nøkur fá saman í býlingum og langt ímillum.
– *Ein Skálvíksferð*




Plássið kallaðist niðri í Eyri. Finsens Minni er tætt við húsini, og Quillingsgarður liggur frammanfyri. [...] Vit høvdu tvinnar torvheiðar, sum hoyrdu til húsini, og vit høvdu skeyti upp á teir. Teir eini vóru í Gundadali, har sum Listaskálin liggur. [...] – *Dimmalætting, 3. juli 2016*




[…] hetta er fyrsta og størsta ítøkiliga ætlanin, sum eisini tekur atlit til, at bygningarnir liggja mitt í einum øki, sum skal leggjast út til frílendi sambært eini stórari frílendisætlan, sum strekkir seg heilt av Boðanesi og niðan í Hoydalar. – *Dimmalætting, 4. august 2017*




Húsið líktist næstan eini riddaraborg. Tað er til enn og liggur á Hunderupvej 71. Tá tað í 1895 bleiv bygt, var tað passaliga langt uttanfyri býin. – *Dimmalætting, 3. februar 2017*




Skotskt whisky er sakin! Seinastu 25-30 árini hevur single malt whisky vunnið sær sætið sum heimsins mest seldi marglætisdrykkur, […] Coleburn [distillery] liggur í einum náttúruvøkrum øki.
– *Dimmalætting, 15. januar 2016*

pf. Wenzel Petersen

Hús ynskjast til leigu ella keyps: Húsini skulu liggja í Tórshavn ella nærhendis. Ringið til 13873, lokal 19. – *Dimmalætting, 16. januar 1988*

5. juli 1985

Hús til sølu: Í Runavík eru eini 110 m2 stór hús til sølu. Báðar hæddirnar eru innrættaðar, húsini liggja væl fyri og við stórum grundøki.

Skúlablaðið

Tann 11. november [1957], sjálvan mortansmessudag, varð hin nýggi skúlin í Sørvági vígdur. Hetta er prýðiligur bygningur í tveimum hæddum. […] Stórt spælipláss er uttan um skúlan, sum liggur vakurt fyri beint oman fyri kirkjuna við forsíðuni móti suðri. Sólagangurin er sera góður.

– *Blaðstjórn: Marius Johannesen, við ábyrgd og Ludvig Petersen*

Leif Láadal



Vit eru staddir uttanfyri Café Paris í miðbýnum í Reykjavík. […] Café Paris liggur í sama stóra bygningi, har sendistovan hjá føroyingum helt til tey fyrstu árini, […] – *Dimmalætting, 13. februar 2015*

Fiskivinnuskúlin í Vestmanna

Latið okkum fáa frið at vera í Vestmanna. […] At skúlin liggur í Vestmanna er mennandi fyri bygdina, samstundis sum skúlin liggur sentral fyri í allar mátar.

– *Sosialurin 8. desember 1994*

Dagfinn Olsen



Hús keypt á Velbastað til avvenjingar: Tey keyptu húsini liggja á Velbastað og sigast vera væl innrættað til uppihaldsheim, meðan tillagingin til eitt nítt liv uttan rúseitran fer fram. – *Dagblaðið, 1. september 1986*

Hjørdis Klein



Norðoya Heimavirki havt góðan byr: Eisini er at fegnast yvir hvussu centralt húsini liggja fyri í Klaksvík, og stórt parkeringsøki er eisini nærhendis.

– *Tingakrossur, 11. juni 1982*

Havnar Telvingarfelag

Frá 1. juni 1982 er ætlanin at útleiga niðaru hædd i húsum okkara í R. C. Effersøgøtu 17, í Tórshavn. […] parkeringsøki er uttanfyri og soleiðis sum húsini liggja fyri, eru tey vælhóskandi til skrivstovu-, handils- ella goymsluhøli.

– *Sosialurin, 29. mai 1982*

29. januar 1986

Tann 5. oktober 1985 flutti tann fyrsta familjan í nýggj hús á Kambsdali og stutt eftir flutti eisini tann næsta. […] Steintór Larsen [bygdaráðsformaður] sigur, frá familjuni, sum flutti inn í Dalin fyrst í oktober 1985, at har er veðurgott, og hetta kemst helst av, at húsini liggja so langt inni í dalinum.

18. apríl 1984

Sethús á Argjum til sølu: Húsini á Garðsgøtu 20 eru til sølu. Húsini eru í tveimum hæddum, 112 fermetrar hvør, báðar innrættaðar. Tvær altanir, ein frá stovu og ein frá soviverilsi. Kjallarahædd vælegnað til útleigan. Fríttstandandi bilskúrur, 40 fermetrar. Hjallur og úthús til havareiðskap. Stór grasplena. Alt liðugt rundanum við grótgarði móti vegi. Grundøkið 636 fermetrar. Húsini liggja í blindvegi. Gott útsýni.

28. august 1950

Handilsvirkið D. P. Höjgaard á Toftum hevur bygt saltfiskaturkihús sum var tikið í nýtslu í seinastu viku. Hetta turkihús man vera eitt av teimum störstu í landinum. Tað er í trimum hæddum: kjallari og tvær yvir- hæddir. Til ummáls er hövuðs-byggingin 33x19 alin og útbyggingin 18x18 alin, húsini liggja innan fyri handilshúsini móti sjónum.

27. mars 1943

Húsabygningar til sølu: Til sølu er um hóskandi boð fæst: Eini jarnklødd sethús við jarntaki, 16x12 alin, við tveimum stórum kvistum, ein miðskeiðis á hvørjari síðu, hjallarin 3½ alin høgur. Ein hjallur 8x4 alin. Ein krambúð við vørugoymsluhúsi og fiskakjallara, stødd 16x6 alin. Eitt neyst við jarntaki 25x5 alin. Øll húsini liggja nær við strondina í Kollafirði. Nærri við at venda sær til Thomas Thomsen, Fuglafirði.

Blað Verka- og Veiðimanna

Sum eg segði, var pápi mín var føddur í húsinum, har eg sjálv eisini varð fødd. Men tey vórðu noydd at selja og flyta, tí húsini lógu í einum øki, ið varð ætlað hvítum fólki. Hetta sama hendi fyri nógv onnur fólk. – *2. september 2004*

Firouz Gaini



Havnin veksur og veksur, røkkur longur og longur norður og upp [...] Húsini fara skjótt at liggja heilt uppi í 200 metra hædd. [...] tað var ómøguligt at meta um, hvat umbyggingin fór at kosta. Húsini [løgtingshúsini] lógu í hjartanum í høvuðsstaðnum. Nógv atlit máttu takast, sum seinkaðu arbeiðinum.

– *Mynstur broytast (Landsverk bygt land í 60 ár)*

Mentamálaráðið

Fram við øllum strondum í heimshøvunum hava verið til samans 214 hvala-støðir. Norðmenn bygdu og áttu meira ella minni allar støðirnar, og vóru allar gjørdar eftir somu skipan. Einasti munurin var støddin, men tey ymisku húsini lógu eins á øllum plássunum. – *1. februar 1987 (Hvalastøðin við Áir)*

Vagnur Michelsen



Nógvar minniligar løtur høvdu vit hjá Herborg og Jógvani. Herborg var fryntlig, fitt og arbeiðssom kona. Serliga minnist eg svimjihylin, Jógvan gjørdu børnunum í kjallaranum. Húsini lógu so nær ánni, og hann var so bangin, at nakað skuldi henda børnunum. – *26. desember 2022*

Alex Sólstein



Húsini vóru laðað upp av gróti, takt við flag og strá og lógu oman fyri núverandi bygdina, heldur vestan fyri Village Bay. Tú legði merki til, at húsini lógu soleiðis, at tey fingu sum mest av sólini, og at lendið var rættiliga turt, og tað setti væl undan. – *Norðlýsið,17. juni 2015*

BKI-mekling, Bryggjubakki

Hús til sølu í Tórshavn: Um hóskandi boð fæst, selja vit eini sethús yviri við Strond. Stødd: 70 m² x 3 hæddir (kunnu útbyggjast við u.l. 70 m² afturat). Grundøki: 470 m². Húsini liggja væl fyri og hava sera gott útsýni. Møguleiki er eisini fyri innrættan av skrivstovu, verkstaði o.a.

– *Dimmalætting, 20. september 1986*

21. oktober 1969

REKKJUHÚS TIL SØLU: við tveimum leyligheitum; hin størra er leys og klár til innflyting. Sølurprísur ca. 130 til 135 túsund. Húsini liggja í eystara býarpartinum. Stórt lán kann skaffast góðum keypara, Áhugaði sendið billett til Dimmalætting merkt. 69149.

BÝLIÐ pf
Tlf. 11200

Sethús í Fuglafirði: Um hóskandi boð fæst selja vit eini hús í Fuglafirði. Stødd: 3 hæddir á 56 m³. Grundøki: 542 m². Húsini liggja sera væl fyri og hava gott útsýni. – *Dagblaðið, 15. februar 1988*

29. desember 1951

Húsasøla: Tvinni sethús í Havn til sølu, húsini eru bæði at kalla nýggj, 2 og 3 ár, eru sera væl stoypt, turr frá grundini og upp. Bæði húsini liggja væl fyri, onnur eystari og hini vestari í býnum, tey kunnu verða bæði sethús og handilshús. Nærri frágreiðing hjá mær. A. ZISKA, telf. 337. – *29. december 1951*

23. august 1900

Imislig tíðindir eru á ferð um háskúlan, ið nú er í gerð vestantil á Borðoynni. Nógv finnast at plássinum, at tað er illa valt. […] Lendingin [í Klaksvík] er til kyrru sum meðal pláss í Norðoyggjum. Tá, ið vit minnast til, at Klaksvík hevur eina flest og høgligast postferðir av øllum plássum uttanfyri Havnina, kann tað ikki sigast, at háskúlin í tann máta liggur illa fyri.

18. november 1991




Jákup Andreasen



Húsini lógu eitt sindur niðan frá vegnum, og niðanfyri tey var eitt stórt pláss, har tey fingu sær stóran urtagarð. Tá tað leið móti sumri og um sumrini, var Gerda ofta at síggja í urtagarðinum, sum var ógvuliga vakur, og sum Gerda passaði so avbera væl. – *Norðlýsið, 28. januar 2023*

15. desember 1987

Nýggju Føroya-hølini eru væl egnað til endamálið at hýsa ymiskum føroyskum tiltøkum og liggja sera høgliga fyri í miðbýnum í Keypmannahavn. Einar 500 fermetrar tilsamans. Føroysku feløgini hava leigað hølini fyribils í 20 ár, sum ungir føroyskir arkitektar hava innrættað av nýggjum.

Løgtingstíðindi, 1. januar 1983

Í Streymnesi sum so manga aðrastaðni í landinum gongur landsvegurin soleiðis, at sethús liggja báðumegin vegin, aðrastaðni liggja húsini í bygdini øðrumegin og havnalag ella annað, bygdafólkið hevur sína dagligu gongd til, hinumegin. Tann loysn, sum í hesum føri verður brúkt fyri at gera viðurskiftini dámligari ferðsluliga, verður tí ivaleyst eisini nýtt nógva aðrastaðni, […]

14. august 1976

Útvarpið fær nýggj hús um trý ár. […] Øll upptøku- og sendi hølini koma at liggja í miðhæddini í húsinum. Henda hæddin skal eisini rúma redaktións- og skrivstovuhølum uppá tilsamans 200 m².

Sveinur Tróndarson



Hyggja vit eftir roknskapunum hjá teimum báðum stóru uppsjóvarvirkjunum í Føroyum, tað vil siga, at Varðanum Pelagic á Tvøroyri og Pelagos, sum liggur í Fuglafirði, so vísa roknskapirnir, hvussu stór virðir, sum talan er um.

*– Dimmalætting, 16. oktober 2020*

Karin Kjølbro



Fólksins Skúli: Børnini lærdu tá samfelag sítt at kenna við tað at heimið, arbeiði foreldranna og skúlin lógu lið um lið. Í dag búgva vit á einum staði, arbeiða í øðrum, og skúlin liggur á triðja staðnum. Her verður hugsað um Havnina og býirnar. *– (14. SEPTEMBER) 2. september 1978*

Herálvur Geyti (1914-1985)



Jarðabrúksskúlamálið 1875-1952: […] Ein slíkur skúli [á Heyggsgarði í Kollafirði] kundi tá verið ein kulturmiðstøð. Ikki bert næmingar, ið komu har, men eisini fastbúgvandi jarðarbrúkarar, vestan, norðan ella sunnani frá hövdu havt hövi til at komið til skúlan, ein hálvan ella heilan dag og nógv lættari hevði tað verið at fingið hesar fastbúgvandi at komið til eitt skeið 4-6-8 dagar langt enn tá skúlin liggur á Sandoynni, so heldur í Hoyvík. Úr Kollafirði var lættligt, bæði hjá lærarum og stjóra, at fari út til ymisk jarðarbrúk við næmingum og sýnt teim brúk, ið vóru millum tey frægu. Nógv lættligari var tað, um skúlin lá mitt í Föroyum, […] *Kollafirði í mars 1952. Herálvur Geyti, landbúnaðarfröðingur. – Dagblaðið, 18. mars 1952*

2. september 1961

Har er hugnaligt at vera, og einastandandi vakurt er tað, har skúlin liggur oman móti Lítla Belti, men men ikki minst har verður lært. […] Gævi um skúlin á Frælsinum kundi givið teim ungu, hann søkja, líka gott í beinini, sum teir føroyingar, ið vitjað hava Snoghøj, veruliga hava fingið. So stendur væl til.

24. februar 1984

Ósáskúlin kann ídag ikki takast sum ein veruliga sjálvstøðugur skúli […] Hesin skúlin hevði als ikki kunna virka, um hann lá fyri seg sjálvan […]. Um vit hyggja eftir eysturskúlanum í Havn, sum var bygdur til 1200 næmingar og sum skuldi leggjast har mest nýbygging var tá hesin skúlin var í umbúna, […]. Hesin skúlin liggur í einum upptøkuøki, ið hevur Nólsoyarfjørð og eitt stórt ídnaðarøki sum nærmastu grannar, […]. Nógv annað kundi verið nevnt í hesum samanhangi, men lat tað liggja fyri fyrst.

11. juli 1981

[…] tað mesta av tí skrivaða tilfarinum mælir til at leggja skúlan á Kambsdali, hóast at tað eru fleiri og nógv betri argument fyri at leggja hann í Runavík. […] Tað hevur eisini verið nevnt, at tað er umráðandi, at skúlin liggur so nær einum miðstaðarøki sum gjørligt. […] skrumbla tey upp í tabellir, sum best ber til bara úrslitið vísir, at skúlin má ikki leggjast í Runavík. – *Jóhannes Steingrund*

9. oktober 2020

[…] tað er ikki av ongum, at Smyril Line og OCD ynskja sær eina farmamiðstøð í Runavík. Stutt innanfyri havnarlagið liggur til dømis stóra framleiðsluvirkið hjá Bakkafrosti, sum støðugt økir sína framleiðslu.

Karin Kjølbro



Og nú frætta vit, at lastbilar skulu koyra við 300.000 rúmmetrum av gróti úr Sandstunnilinum yvir Gomlu Rætt gjøgnum Havnina […]. Koyrast skal eftir Ringvegnum, har skúlin á Fløtum og Glasir liggja. Har er frammanundan ovurstór ferðsla, […] – *Dimmalætting, 18. september 2020*

18. mai 1991

Nú líður so mikið væl við sjómansheiminum í Reykjavík, at tað verður vígt og tikið í nýtslu 2. juni. […] Føroyska sjómansheimið liggur væl fyri miðskeiðis í Reykjavík.

27. april 1972

Fyri stutt síðani var ein sonevndur "úlvamaður" funnin uppi millum fjøll í Spanien. […] Tað eru nakrar nunnur, sum hava funnið hansara goymistað og flutt hann oman úr fjøllunum til eitt heim rikið av katólskum nunnum. Heimið liggur í býnum Alicante.

Árni Helmsdal



Skýlið í Odense bjóðar til kristiligan stevnudag. […] Kratholmskolen er kristni frískúlin í Odense, og hann liggur í útsynningspartinum av hesum ævintýrbýnum […]. – *Sosialurin, 10. september 1998*

Kinna Poulsen



At ferðast er at vera til! Miðskeiðis í býnum liggur býarmerkið, "Il Duomo", risastóri kupulin hjá Filippo Brunelleschi frá 1436, sum var eitt tað fyrsta verkið vit hoyrdu um á sinni í stílsøgu á universitetinum í sambandi við renesansuna og sum hoyrir til dómkirkjuna í Firenze, Cattedrale di Santa Maria del Fiore.

– *Dimmalætting, 15. oktober 2021*

Petur Jacob Sigvardsen



Samanumtikið tykir mær, at hesi miðaltøl bert kunnu vera leiðbeinandi hjá tí einstaka skúlanum, har ið hann kann fáa at vita, hvussu skúlin liggur í mun til skúlar landsins í miðal. Hetta man eisini vera tað, sum tann einstaki skúlin serliga bítur merki í landsroyndini viðvíkjandi. – *Skúlablaðið, 1. marts 1987*

27. september 1974

Vit eru fult greiðir yvir, at summir skúlar eiga at liggja í Havnini og aðrir í Klaksvík; men við okkara besta vilja, duga vit ikki at síggja, at einki grundarlag skal vera fyri einum HFskeið her í oynni. – *Jógvan Olsen, løgtingsmaður*

14. mai 1960 — 14.

Tað fer nú at líða nakað við bygging nýggja sjómansskúlans í Havn. Skúlin liggur væl fyri og sæst sjónligur frá sjónum. Lítil stílur er í hesi bygging. Frá sjónum lítur hann ikki øðru vísi út enn sum tveir kassar, har annar liggur eftir jørðini, meðan hin stendur upp og niður. Og við tí „nalva", byggingin hevur fingið teirri megin, sum snýr móti býnum, sær hann heilt ræðuligur út.

Sveinur Tróndarson



Longu frá byrjan hevur verið tosað um eitt nýtt bryggjarí, sum skal liggja norðanfyri Kvívík, og tað er heilt greitt ein øðrvísi og áhugaverd ætlan hjá hesum nýggja bryggjarínum. Men hetta er alt nakað, sum liggur longur frammi í tíðini, tí tað tekur sína tíð at fáa ferð á eitt whisky-bryggjarí.

*– Dimmalætting, 22. oktober 2021*

15. december 1990 — D

Nemingaheimið undir Fjalli verður við hesum boðið til leigu summarið (juli august) 1991. Stak vælegnað t.d. til summarhotel. […] Heimið liggur nærindis Handilsskúlanum, hevur 36 kømur, við køki, bað, wc og stovu.

7. juni 1974 — Tíðindablaðið

Býráðið hevur samtykt at keypa telegrafstjórahúsini í Tórsgøtu frá Det Store Nordiske Telegrafselskab. Keypspeningurin er 850.000 kr. Húsini liggja niðan fyri tann gamla Realskúlan. – *blaðstjórn: Finnbogi Ísaksson og Árna Absalonsen*

12. november 2021 — D

Skeiva Pakkhús varð bygt í 1927, og hevur upprunaliga verið brúkt sum kola-goymsla […]. Húsið liggur sera væl fyri niðri við sjóvarmálan, og úr vindeygunum í matstovuni sært tú millum annað út á gomlu sluppina Westward Ho.

Løgtingstíðindi, 1. januar 1982

Loysnin verður nógv bíligari enn at byggja eitt nýtt heim. Heimið liggur í útjaðaranum av hospitalsøkinum, men kortini so nær við, at eitt ávíst samband við sjúkrahúsið kann varðveitast. Tá ið eitt so stórt røktarheim er tøkt, kunnu tey manglandi plássini fáast til vega við fleiri smærri røktarheimum.

25. september 1973 — 14.

SKÚLAVÍGSLA Í HVALBA: Fyrradagin varð nýggi skúlin í Hvalba vígdur. Nýggi skúlin liggur vestur móti Norðbergsvatni, innan á Villsnabrúgv. Tað var Eivind Vilhelm varabiskupur, ið vígdi skúlan.

28. oktober 1903 — Tingakrossur

Eyðar: Hesin skúlin liggur á eysturlandinum nakað uppi í landinum. Skúlaskipanin er sum á hinum fyrr nevndu. Í garðsdrift er mest dent løgd uppá seyðahaldi, og hartil verða gjørdar ymsar royndir við vatning av eingjum. Skúlin varð stovnaður 1883. – *M. Winther-Lützen (ferðafrásøgn)*

30. august 1968 — Glaðustrok

Vågan Folkehøyskole, […] er stovnsettur av málfrøðinginum og skúla-manninum Mauritz Steebock Arctan. Í 1904 seldi hann skúlan til meðlærara sín Ketil Løndal, ið flutti skúlan til tað gamla handilsplássið Finnnesset í Vaagan í 1909, har skúlin liggur og hevur frítt útsýni yvir Vestfjørðin.

Framhald á blaðsíðu 15

# Ignorance is bliss

Sonne er lukkuliga óvitandi um, at á føroyskum verður sagt at fjøll *liggja*. Hann nevnir heimsins hægsta hús og Slættaratind í sama andadrátti. Men, hann fær onga hjálp frá Slættaratindi, tí eisini hann *liggur,* sambært staðkendum fólki. Spurningurin um *hædd* á bygningum/fjøllum er óvikonandi, tí orðið *liggja* er abstrakt. Tað finnast eyðsýniliga fólk, sum í ovfarakæti leggja sína óvitan út á blik.

Fyri tann ókenda í føroyskum, kann tað ljóða sum volapük, tá Umhvørvisstovan sigur: »Hægst *liggjandi* sethús í Føroyum *liggja* á Norðasta Horni í Tórshavn. Hæddin *liggur* um 165 m yvir sjóvarmálan«. Tvørturímóti, er hetta gott føroyskt málbrúk.



Slættaratindur ár 2000 (tá Føroyar skuldu loysa)




Heimsins hægsta hús Barj Dubai, næstan líka høgt sum Slættaratindur, er farið at liggja. Empire State Building stóð inntil fyri nøkrum árum síðan, tá ið skrivstovur, hús, kirkjur, raðhús, hallir, sjúkrahús, bygdarhús, ráðhús, ja, alt sum stóð er farið at liggja. – *Føroysk rættstaving, 15. februar 2011*[2]

Á føroyskum vildu vit sagt at Kalifatornið *liggur* í Dubai, líka sum Eifeltornið *liggur* í París og Empire State Building *liggur* í New York o.s.fr.. Og Slættaratindur *liggur* undir liðini á Gráafelli og Búgvin *liggur* beint niðriundir Ambadali og Gjógv *liggur* opin ímóti landnyrðinginum […] o.s.fr..




Gjógv er eitt brimpláss, liggur opin ímóti landnyrðinginum og er umgyrd av fjøllum til 3 síður. Fjøllini á suðursíðuni eita Tyril og Miðdagsfjall, ið gjáarmenn nú ynskja at fáa hol á. Tað vildi verið gott fyri bygdina. Vestanfyri liggur Gráafelli, ið er næsthægsta fjallið í Føroyum, og Slættaratindur liggur so undir liðini á Gráafelli. So koma Sandfelli, Nøvin og Fjallið ein heilur fjallagarður rundanum bygdina. Aftanfyri Fjallið liggur tann tiltikni Ambadalur, og beint niðriundir Ambadali liggur Búgvin, […] – *Dagblaðið, 21. mars 1984*

---

2 Uppslagið hjá Sonna Smith kom nakrar fáar vikur eftir at Facebook bólkurin Føroysk rættstaving varð stovnaður og hann hevur ikki helmað í síðani. Næsta áminningin um, at tað einasta rætta er at siga at høgir bygningar standa, kom 185 dagar seinni, nevniliga 19. august 2011 (sí blaðsíðu 4), har hann aftur nevnir Eiffeltornið. Legg til merkis, at hann skrivar Eiffeltornið við bindustriku (Eiffel-tornið). Á føroyskum verður Eiffeltornið skrivað í einum orði og á enskum í tveimum orðum (the Eiffel Tower). Bindistrikan er eitt av yndisevninum hjá Sonna. Men, hon er ikki tað einasta evni hann er serfrøðingur í. Tað fáa vit at hoyra meira um, í komandi pørtum av Móðurmál & málreinsan.

Landsverk

Leiðin um Hestin er ein sera vakur 9,3 km langur teinur, sum byrjar í Lopra […] Beinisvørð, sum er ein av okkara náttúruperlum, liggur eisini fram við hesum vegi. […] Nógv fólk koyra eisini henda vegin og seta bilin fyri at ganga fram við eggini oman ímóti Lopra, har tað ber til at síggja ta stórbæru náttúruna á vestursíðuni á Suðuroynni. – *Samferðsuætlan 2018-2030*

Eivind Weyhe



Yvirhøvur nevnir hann [Hammershaimb] nøvnini sunnanífrá og norðureftir […]. Tey fyrstu nøvnini hann nevnir, eru: Rangibrekka, Lírisfelli, Spáaklettur, Gásafelli, og tey liggja á rað úr sunnan og norðureftir í erva, fram við markinum til Giljahaga. – *Fróðskaparrit, 62. bók · 2015*

Umhvørvisstovan

Fjallatindurin Lokki á Borðoynni er 754 m. Hægsta punktið á Borðoynni, sum er 772 m, liggur umleið 600 m norðanfyri tindin.

28. juni 2019

Um miðjan juli mánað sóu teir land eystanfyri: Høg, kavaklødd fjøll og eitt spískt gosfjall, helst Mount St. Elias, sum liggur á markinum millum Alaska og Kanada, sum nú er.

22. juni 2018

Ársins longsti dagur var í gjár, og á longsta degi nýta fólk ofta høvið at gera okkurt serligt burturúr. […] 120 fólk nýttu høvi at ganga niðan á Føroya næst-hægsta fjall, Gráfelli. Gráfelli er 856 metrar høgt og liggur í norðara parti av Eysturoynni, tætt við Funningi.

Eivind Weyhe



Helst kann tað vera skilagott at víðka týdningin av orðinum fjall eitt sindur í mun til lýsingina í FO, so at fjall eisini kemur at fata um 'fjallavíddir ið liggja høgt' (sbr. Nynorskordboka um fjell: 'vidde, område som ligg høgt'). […] Bassarnir: Tríggjar høvdir á Mjóvanesi í Lamba. Tær verða eisini nevndar hvør sær: *Heimastibassi, Stóribassi, Geldingaklettur*. […] Hæddirnar, sum eru 5 ella 6 í tali og liggja á rað niðan frá Mjóvanesi, eru úr 198 m upp í 263 m.

– *Fjallanøvn í Føroyum, 2020*

Arne Vatnhamar



Denali er eitt tað kaldasta fjallið í heiminum. Tað liggur avsíðis, og tað tekur tríggjar vikur at vinna á tí. Ein skal hava alt við sjálvur. Tann norðuramerikanska tímalønin ger, at ikki er vanligt við berarum, sum t.d. í Himalaya og Suður-amerika, sigur Arne [Vatnhamar]. – *Dimmalætting, 27. oktober 2017*

8. juni 2018

Vesturvarði laðaður uppaftur: Vestanfyri Havnina sæst ein stórur varði, sum dagar undan sýnuni á 222 m høga fjallinum "Fjallið", sum liggur millum Kirkjubøreyn (351 m) og Húsareyn (345 m). Varðin nevnist Vesturvarði.

– *Dimmalætting*

Eirikur Lindenskov



Sornfelli – fjallið, sum var ímyndin av kalda krígnum í Føroyum, er á Streymoynni og er 749 metrar høgt. Fjallið liggur 12 km úr Havnini í beinari linju, 20 km í bili. Tað var í 1958 at løgtingið gav Nato loyvi at byggja hernaðarliga eftirlitsstøð á Sornfelli. – *in.fo, mai 2014*




Sjálvur slapp eg eisini at súkkla ein part av hesum teini, sum millum annað gongur fram við strondini, eins og farið var niðan ímóti fjøllunum, ið liggja í ein útnyrðing frá strondini. […] El Faro vitin liggur uttast á nesinum vinstrumegin á myndini. – *Dimmalætting, 20. november 2015*




Tað er stórur altjóða áhugi fyri at seta ein stóran radara upp á Sornfelli. At seta ein slíkan radara upp vil hava fitt av arbeiði við sær. [...] Sornfelli liggur innanfyri Havnar kommunu so nýggja Býráðið skal fara aktivt inn í fyrireikingarnar og samráðingarnar til slíkan radara sum fer at hava risastóran týdning fyri Føroyar uppá mangar mátar. – *Norðlýsið, 7. oktober 2020*

24. september 2021

Heilaga fjallið liggur nógvar dagar at koyra úr Lhasa og uppaftur longur úr Katmandu, men frá nýggja marknaliðnum eru bara fimm tímar at koyra til Kailash, og pílagrímarnir fáa Muktinath-templið við á leiðini.




Nagorno Karabakh er eitt lítið fjallalendi, ið liggur í Aserbadsjan. Har búgva umleið 145.000 fólk, harav 95% eru av armenskum uppruna.
– *Dimmalætting, 15. apríl 2016*

Í grannalondunum verður eisini sagt at fjøll *liggja* og har hava tey ongar trupulleikar við slíkari málbering. Men, í lítla fjallalandinum, mitt í Norðuratlantshavi, fáa nøkur málreyst fólk gásarhold av slíkum málburði. Tey eru púrasta ráðaleys, tá talan er um móðurmálið. Tað forðar teimum kortini ikki — í tíð og ótíð — at prætika fyri teimum ið eru fullvitandi um, at føroyskt er eitt kropsmál.




Frjálsa alfræðiritið

is

Eyjafjöll eru fjallgarður á Suðurlandi sem liggur vestur úr Mýrdalsjökli. [...]
Í Eyjafjöllum eru meðal annars Seljalandsfoss og Skógafoss en einnig margir minni. Í fjöllunum eru einnig margir hellar s.s. Paradísarhellir.

Sognefjellshytta no

Galdhøpiggen, Norges høyeste fjell, er en perfekt dagstur med Sognefjellshytta som utgangspunkt. Galdhøpiggen (2469 moh.) er fastland-Norges, Skandinavias og Nord-Europas høyeste fjell. Fjellet ligger i Jotunheimen i Lom kommune og i Innlandet fylke.

Gränslandet se

Städjan och Nipfjället är två välkända fjäll i Dalarna. De ligger i ett av Gränslandets mest lättillgängliga naturreservat där du även kan uppleva gammelskog, glittrande sjöar, myrar och gamla fäbodar. Städjan reser sig 1131 meter över havet.

Gammle Børnesange dk

Langt ud' i skoven lå et lille bjerg / aldrig så jeg så dejligt et bjerg / Bjerget ligger langt ud' i skoven.
På det lille bjerg der stod et lille træ / aldrig så jeg så dejligt et træ / Træet på bjerget / Bjerget ligger langt ud' i skoven.

Tourentipp de

Obwohl die Berchtesgadener Alpen ganz im Norden des Alpenkammes liegen und bis ans Alpenvorland heranreichen, weisen sie im Schnitt eine beträchtliche Höhe auf und sind zum Teil wilde Felsgipfel.

PeakVisor uk

The Kitzbüheler Horn (also spelt Kitzbühler Horn) is one of the most important mountains in the Kitzbühel Alps in Tyrol, Austria, whose eastern flank lies near the smart ski resort of Kitzbühel. With a height of 1,996m (AA) it only just misses being a 'two-thousander'.

Framhald frá blaðsíðu 11

6. juni 1984

FÖROYSK GUDSTÆNASTA: verður i Stor Marks kirkjuni í Nakskov hvítusunnudag kl. 5. Kirkjan liggur við Ringvejen 68. Aftaná gudstænastuna verður høvi at hittast til hugnaligt prát, har øll eru vælkomin at verða við.

7. juli 2017

Viðkomandi, ið ynskir at vera dulnevndur, var staddur á einari av fiskamatstovunum, ið liggur mitt í Borough Market og á somu gøtu sum trý av støðunum, [...]

Georg L. Petersen



Ákoyringar hava verið nógvar, nú SEV fer undir at útbyggja framleiðsluna á Sundi við einum nýggjum verki, sum liggur innanfyri í einum gomlum grótbroti – *Dimmalætting, 26. mai 2017*

Óli Breckmann



Hvíldarheimið Naina liggur so friðarliga goymt millum trøini í Viðarlundini í Havn. [...] Landsjúkrahúsið brúkar Hvíldarheimið meir sum "pensionat" fyri sínar sjúklingar enn Suðroyar og Klaksvíkar Sjúkrahús gera. Ivaleyst er ein atvold tann, at Hvíldarheimið liggur so nær og kann hýsa ambulantum sjúklingum hjá Landsjúkrahúsinum geografiskt lættari enn øðrum. – *Dagblaðið, 15 juni 1990*

Steintór Larsen



Tann 5. oktober 1985 flutti tann fyrsta familjan í nýggj hús á Kambsdali og stutt eftir flutti eisini tann næsta. […] Steintór Larsen sigur, frá familjuni, sum flutti inn í Dalin fyrst í oktober 1985, at har er veðurgott, og hetta kemst helst av, at húsini liggja so langt inni í dalinum. – *Sosialurin, 29. januar 1986*

1. oktober 2021

Í grundgevingini stóð, at orsøkin til noktandi svarið var, at virksemið hjá Tavuni liggur í Eysturoynni, og tískil ikki leyk treytirnar í lógini.

1. september 1986

Hús keypt á Velbastað til avvenjingar: Tey keyptu húsini liggja á Velbastað og sigast vera væl innrættað til uppihaldsheim, meðan tillagingin til eitt nýtt lív uttan rúseitran fer fram.




Hilmar Jan Hansen

Tá tað var komið eitt sindur út á seinnapartin fríggjadagin, fór pulsurin spakuliga upp inni á frálíka vertshúsinum, Brauhaus Ernst August, sum liggur mitt í býnum í Hannover, og sum eins og fyri 10 árum síðani var savningardepil hjá føroysku fjepparunum, ið komu við bussum til Týsklands. – *Sosialurin, 10. september 2012*

Skúlablaðið, 1. oktober 1953

Aftan á hetta skrivaði ein lærari í donskum blað, at tað var einki at undrast yvir, at fólkið í Föroyum hevði so lítlan áhuga fyri skúlum, tá ið prósturin vísti skúlunum so lítlan áhuga, at tað liðu hálv og heil ár millum vitjanir hansara í skúlanum, hóast skúlin lá prestagarðinum so nær, at vanlig gongd teirra millum bert tók hálvan tíma.

24. september 2021

Og tá vit í síni tí skuldu hava eina brennistøð, sum skuldi taka sær av júst tí trupulleikanum, tá brúktu vit ár til at stríðast um, hvar ein slík skuldi liggja, tí hon skuldi ikki liggja inni hjá "okkum". Vit eru komin víðari harfrá, og vit duga nú betur at síggja, at tað er neyðugt at vit taka okkum av náttúruni.

Heini Weihe



Ræðumyndin er hinvegin nøkur av teimum sethúsum, ið fólk lótu byggja í 70'unum, har hædd slett ikki bleiv tikið fyri umhvørvið runt húsunum. Tá var tað typiskt, at húsið lá á suðursíðuni á stykkinum og allur havin lá í skugga. Tað gav onga meining, […] – *Sosialurin, 27. mars 2019*

15. apríl 1983

DAG

Seks hús tikin í nýtslu: Tað vísir seg eisini, at vit hava selt húsini uttan at hava royndt at selt tey, […]. Ein hevur rakt ein tørv, sigur Mads Guttesen at enda. Annars verður upplýst, at Byggimiðstøðin ætlar at halda fram við hesum byggihátti. Arbeitt verður nú við einum nýggjum plani og koma hesi hús at liggja beint við síðuna av teimum núverandi.

Oddfríður Marni Rasmussen



Í hesum næsta Afturhvarvi fari eg at hvørva aftur í skúlaárini fimta, sætta, sjeynda og áttanda flokk á Sandoyar Meginskúla. […] Skúlin lá einar tríggjar kilometrar heimanífrá. – *Skúlablaðið, 1. februar 2004*

Bjørn á Heygum, adv.



Vælhildin størri sethús í Kollafirði verða hervið lýst til sølu. Støðd: 140 m². Byggiár: 1978. Grundøkið: 910 m². Húsini liggja høgliga fyri við beinleiðis atgongd til veg, og við sera góðum parkeringsmøguleikum beint uttanfyri.

– *Dimmalætting, 17. september 1988*

18. juni 2021

D

Ítróttarháskúlin, sum liggur í Vági, hevur uppá stutta tíð fingið eitt rættiliga gott umdømi, tí hann dregur ungdómar til bæði úr Føroyum og uttanlands.

Demmus Hentze (1923-2016)



Eftir áheitan frá Føroya Skiftirætti verður útboðið til sølu matr. nr. […] í Klaksvík við ástandandi sethúsum, stór 8,4 x 13,6 m. Húsini liggja á Brekku. Tilboð skulu latast inn til undirritaða. Demmus Hentze, landsrættarsakførari. […]

– *Dimmalætting, 15. december 1984*

8. desember 1960

Tinga krossur

Tað skal verða nevnt, at fara at byggja kirkju uppi á Glasheyggi, verður ikki dámt av øllum, tí her kemur hon at liggja ógvuliga ósentralt fyri, tá vit hugsa um hvussu væl kirkjan liggur fyri í dag. Um tað eru fleiri pláss tøk hvar hugsast kann vera at byggja kirkju á veit eg ikki. – *Havnarborgari*

12. mars 2021

D

Framløgan krógvar ikki, at málið hjá fyritøkuni er at byggja síni egnu framleiðsluhøli, sum skulu liggja í Ognarhaganum í Kvívík.

Randi Jacobsen



Leygardagin 5. oktober fluttu tey fyrstu fólkini í nýggja býlingin á Kambsdali. Ella ta nýggju bygdina, tí húsini liggja einar tveir kilometrar frá Fuglafirði, og tá alt er bygt, verður tað sum ein miðal stór bygd í Føroyum eini 150 hús. – *Sosialurin, 15. oktober 1985*

Essa Arge, 1925-2007



[…] eftir at kommunan hevur keypt hús úti við Strond, soleiðis at húsini [umlættingarheimið] í V. U. Hammershaimbsgøtu kunnu innrættast til hetta endamál. Hesi húsini liggja nærhendis verandi ellisheimi, soleiðis at tað kann hava sum mest felags við ellisheimið, […] – *Dagblaðið, 21. oktober 1983*

16. august 1947

Av 800.000 skúlaskyldugum börnum gingu bert 300.000 í skúla. Eisini búgva tey so langt burtur frá skúla, og samferðsluviðurskiftini eru vánalig, so foreldrini hava ikki ráð at senda börnini so langt burtur. Men hóast skúlin liggur tætt við heimið, so er fátækdómurin so stórur, at börnini mugu verða send út at forvinna og fara ikki í skúlan.

17. september 2021

KROSSORÐAGÁTA: Á hvørjari gøtu í Washington liggur tað hvíta húsið, sum hevur verið bústaður hjá øllum amerikonskum forsetum síðan 1800?

Sveinur Tróndarson



Nú er tó sjónligt fyri øll, at talan er um ein framkomnan garð. Tað sæst væl, tá man stendur í túninum, har sethúsini liggja øðrumegin og har fjósið og brunnarnir eru hinumegin. – *Dimmalætting, 2. september 2016*

17. september 2021

Renningin byrjar við Annapurna Base-camp, sum liggur á 4130 metra hædd - næst hægsta maratonrenningin í Nepal. Runni verður ársdagin fyri fyrsta liðinum á Annapurna. Tað megnaði Mariuice Herog við síni manning 3. juni í 1950

utoyggj.fo

PISA og smáir skúlar: [...] Tá umræður smáar skúlar, er tað ikki trupulleikin, at skúlin liggur í einari lítlari bygd. Trupulleikin er skipanin av skúlanum. Vánaliga PISA úrstlitið var fyri alt landið, tvs. eisini teir stóru skúlarnir dumpaðu.

– Útoyggjafelagið, 4. februar 2010

Tjóðsavnið

Svalhúsið er til at goyma mjólkarúrdráttir í, so sum mjólk, róma, smør og so framvegis. Her hevur verið svalligt inni, og húsið liggur beint við ánna, eins og hjallurin ger. Hetta húsið er, eins og nógv onnur hús, uppafturbygt.

tutl

Tutl er eitt føroyskt plátufelag, sum hevur heimstað í Havn. Plátufelagið hevur ein handil, sum selur tónleikaútgávurnar hjá felagnum. Handilin liggur á Káta Horninum í Havn. – *Havnarkortið*

Óðin Ódn



Missiónshúsið hevði nakað dragandi. Hvørt einasta sunnukvøld var tað fullsett og ikki minst av óvitum og ungum. Missiónshúsið liggur á Hamri, og her høvdu tey sína gongd. Tey, ið standa fremst í huga mínum eru: Gumman í Giljum, Jakubina og Kristian hjá Jákupbinu, [...] – *Dagblaðið , 3. oktober 1990*

5. mars 2021

Tað var upprunaliga ætlanin, at tjóðleikhúsið skuldi liggja á Skálatrøð. Hetta fall kortini ikki í góða jørð hjá pørtum av handilsvinnuni í økinum, [...]

> The internet's rise has been the greatest expansion in information access in human history, has led to the exponential growth in the total amount of data in the world, and has facilitated a spread of knowledge, ideas and social movements that was unthinkable as recently as the 1990s.

Tað er tí ongin umbering ikki at vita hvat hendir á tí málsliga økinum úti í heimi. Tí er tað undrunarvert at fólk í Føroyum — sum hava mál og málrøkt sum teirra livibreyð — eru óvitandi um hvat fer fram í málsligari gransking í grannalondunum.

**EISINI Í SVENSKUM OG DONSKUM**

Klara Jegéus



### Intransitiva positionsverb i svenska och danska

En semantisk studie om de intransitiva positionsverben *stå*, *sitta* och *ligga* i de nordgermanska språken svenska och danska.

**Sammanfattning:** I denna studie diskuteras användningen av de intransitiva positionsverben stå, sitta och ligga, samt deras olika betydelser och användningsområden. Dessa verb kan användas för att beskriva kroppslig position och plats. Tidigare studier har undersökt deras användning i svenska (inklusive engelska, franska, tyska och finska) med fokus på vanliga användningar och mönster, prototyper, typer av subjekt och lokativa komplement, samt skillnader i användningen av intransitiva verb med olika typer av subjekt. I denna studie diskuteras användningen av de intransitiva positionsverben stå, sitta och ligga, samt deras olika betydelser och användningsområden. Dessa verb kan användas för att beskriva kroppslig position och plats. Tidigare studier har undersökt deras användning i svenska (inklusive engelska, franska, tyska och finska) med fokus på vanliga användningar och mönster, prototyper, typer av subjekt och lokativa komplement, samt skillnader i användningen av intransitiva verb med olika typer av subjekt.

Eg havi tí gjørt mær tann ómak at spyrja Málteigin, um tey trý sagnorðin: *liggja*, *sita* og *standa*, var eitt evni vert at viðgera. Svarið var jaligt:

**MÁLTEIGURIN**

Mánadagur, 22. januar 2024 (07:56)

Solby A. Christiansdóttir



Góðan morgun Poul A Mikladal og orsaka seina svarið. Eg havi verið burturstødd.

Málteigurin hevur fingið tín fyrispurning, og vit takka fyri hann.

Tað eru nógvir spurningar, sum liggja og bíða eftir at verða tiknir við, og tín er komin upp í rúgvuna.

Eg fái tíverri ikki sagt, nær vit taka spurningin við í sendingina, men túsund takk fyri.

Blíðar heilsanir
Solby A. Christiansdóttir
Journalistur

# Field research vs. social media research

**FIELD RESEARCH**

Erika Anne Hayfield



**Abstract:** This article concerns research ethics in small, insular communities such as islands and other locales islanded by topography and/or isolation. Using the Faroe Islands as case, the point of departure is a discussion of how islanders navigate multiple relations and how this might impact research ethics. [...]

**Introduction:** I was sitting across the table from the gentleman I was about to interview. We were in his living room on a southern island of the Faroe Islands. Prior to our meeting I had, over the phone and in writing, provided information concerning the research, my role in the project, as well as my position at the University of the Faroe Islands. As we sat over coffee, I revisited the research and provided as much information as I deemed necessary. We discussed ongoing consent, confidentiality, how his input would be used in the research and so on. As I sensed that we had discussed the project sufficiently, I asked if we should start the interview. He promptly replied: "Before we start, I need to know who I am talking to. Your surname, where is it from? What family are you of?"

*– Author's fieldnotes, February 2019*

> Field research is a process where data is collected through a qualitative method. The objective of field study is to observe and interpret the subject of study in its natural environment. It is used in the field of study of humans and health care professions. — *Enago Academy*

**SOCIAL MEDIA RESEARCH**

Jessica Rogers



**Abstract:** Social media is an omnipresent part of everyday life. It provides users with an easy way to engage and connect with others without meeting face-to-face. This form of communication provides a lot of opportunity for companies and individuals to reach a massive audience.

**What is the purpose of social media, and how does it tie into science?** Well, you see, it all depends on who you know and how active your social media presence is. Is there a benefit for sharing research across social media? The benefits of social media stem from active participation and the generation of new attractive content from an individual. Research is about producing new information, and social media offers unique opportunities to present new content.

> In recent years the number of people engaging with social media has exploded. Social media platforms are now utilised as key locations for networking, socialising and importantly, for reflecting on all aspects of everyday life. Such online spaces therefore hold vast quantities of naturally-occurring data on any number of topics […] — *University of Aberdeen*

“Bólkurin 'Føroysk rættstaving', sum í dag [28. desember 2016] telur 11.154 limir, varð stovnaður í desember 2010. Takk fyri íkast, viðmerkingar, kjak og annað. Kann siga fyri meg, at eg havi lært ómetaliga nógv hesi 6 árini” sigur Malan Háberg, sum var ein av stovnaranum av bólkinum.

Tað er torført at vera ósamdur við Maluna. Sjálvt um bólkurin ikki var ætlaður sum vísindaverk, er hann ein rík kelda at oysa av, hjá teimum sum vilja kunna seg við føroysk mál, mentan og siðvenju.

Júst tað ger, at bólkurin er eitt stak gott grundarlag fyri vísindarligari gransking. Her er ikki neyðugt at fara út at tosa við fólk (field research). Her koma fólk til tín — á einum ókeypis sosialum palli — og fortelja tær teirra persónligu hugsan um alt millum himmal og jørð. Hesin pallur er opin 24/7, soleiðis at náttarravnar eisini kunnu luttaka.

coming up next

Tað er langt frá bara sagnorðini *liggja, sita* og *standa* í eru abstrakt. *Ganga* er eitt av teimum. Orabókin sigur at orðið merkir at: *koma (sær) úr stað við at flyta føturnar*. Sjálvt um fiskur ikki hevur føtur, so er tað vanligt at sig at hann *gongur*. Tað sama verður sagt um grind og nógv annað.




Av tí at lívfiskastøðin liggur uppi á landi, gongur laksurin í einum vardum umhvørvi. Allur sjógvur og vatn, ið kemur inn á støðina, verða filtrerað og sóttreinsað við UV-ljósi. *– Dimmalætting, 23. september 2016*

LEGGJA INN UNDIR SEG




Tann dagin, tá hon [Mette Frederiksen] stongdi danska samfelagið, fóru fólk av húsi til handils, og av einari ella aðrari orsøk valdu tey at leggja vesipappír inn undir seg. Bíðiraðirnar í handlunum vóru langar, [...] sigur Annika. *– Dimmalætting, 27. mars 2020*




At *leggja* inn undir seg. Skal tað skiljast *bókstavliga*, ella er tað *kropsmál* sum Niclas Heri Jákupsson tosar um, og *skaldsligt/poetiskt* sum Óla Jákup Rólantsson nevnir tað?

don't miss it